## VESTMANNA KOMMUNA

Bakkavegur 16 | Postboks 91 | 350 Vestmanna

# LEIÐARI TIL LÁTIPÍPUNA

Søkt verður eftir leiðara til Útibarnagarðin Látipípuna í Vestmanna at byrja 1. oktober 2008.

Stovnurin fevnir um útibarnagarð og frítíðarstovu, og hevur leiðarin ábyrdina av at leggja dagliga arbeiðið á stovninum til rættis. Harumframt hevur leiðarin ábyrgd av fíggjarligu viðurskiftunum og starvsfólkaviðurskiftunum á stovninum.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir einum námsfrøðingi, ið hevur góðar leiðaraførleikar og royndir innan fyrisiting.

**Vit vænta, at:**
- tú hevur leiðaraevni
- tú dugir at seta mál fyri stovnin
- tú ert áhugað/-ur í at menna útibarnagarðin og frítíðarstovuna
- tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur góð samstarvsevnir
- tú megnar at at tryggja eitt greitt og jaligt samskifti á stovninum

**Vit kunnu bjóða:**
- ein grønan stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjøru
- ein stovn, har dentur verður lagdur á alla tíðina at menna arbeiðið við børnunum
- eitt arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á greitt samskifti á øllum økjum
- ein starvsfólkabólk, sum er opin fyri nýggjum avbjóðingum

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Talan er um fulltíðarstarv. Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Vestmanna Kommunu á tlf. 470 110 ella Karl A. Olsen borgarstjóra á tlf. 230 114.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum og viðmælum skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 11. august 2008 kl. 12.

**Útibarnagarðurin** er í Miðalsbrekku í vøkrum náttúruumhvørvi millum Hórðará og Gjógvará – tætt við hagan. Dentur verður lagdur á at geva børnunum upplivingar úti í náttúruni, og at búgva tey til at fara í skúla.
**Frítíðarstovan** er inni á Fjørð – tætt við Fossá, fjøruna og sandin. Dentur verður lagdur á at geva børnunum stuttligar upplivingar saman við javnaldrum, og at læra tey at virða hvønn annan.

---

## Summarfrí

Salongin er stongd frá 1. august.

Opið verður aftur 28. august.

**HARRAKLIPPING**
**Vágsbotnur**

---

# LÆRARASTARV Í SUMBIAR SKÚLA

**Lýst leyst til setanar frá 1.august 2008**

Søkt verður eftir lærara til Sumbiar skúla umleið 20 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett aftan á 1. septembur.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2008/09 vegna lærara í farloyvi.

**Tann sum sett/ur verður skal:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- Dugu at samstarva.
- Vera fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum.
- Verða við til áhaldandi at menna skúlan.

**Førleika krøv:**
Læraraútbúgving. Ynskiligt er, at umsøkjarin kann undirvísa í m.a. ítrótti/svimjing og handarbeiði.

**Lønar og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokkinum 18.1-29.2.

Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avrit av prógvi,CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. juli 2008 kl. 12.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær Arnfinn Bjarkhamar, skúlaleiðara, á tlf. 573875/ 373875.

**Sumbiar skúli**
**Postsmoga 100 · FO-970 Sumba**

---



# Tannklinikkatstøðari
## (Klinikkassistentur)

Tannlæknastovan á A. C. Evensensgøtu sóknast eftir útbúnum tannklinikkatstøðara at byrja 20.08.2008.

Talan er um eitt tíðaravmarka fulltíðarstarv fyri fólk í barnsburðarfarloyvi, við møguleika at halda fram.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum tannklinikkatstøðari
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- ágrýtni

Løn verður ásett eftir nærri avtalu.

Umsóknarfreistin er 08.08.2008.

Umsókn, við viðkomandi skjølum, skal sendast til:

**Tannlæknastovan**
A. C. Evensensgøtu 14
Boks 235
FO-110 Tórshavn

BERIT OLSEN TANNLÆKNI, SÓLVÁ EYSTBERG TANNLÆKNI OG KRISTIAN DJURHUUS TANNLÆKNI.

---

## NES KOMMUNA

650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Frítíðarskúlin á Svangaskarði, Toftir søkir eftir námsfrøðingi

Til Frítíðarskúlan verður søkt eftir:
- 1 námsfrøðingi at arbeiða 20 tímar um vikuna í avloysarastarv frá 01.09.2008 til 30.06.2009

Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkaða starvið.

Frítíðarskúlin heldur til á Svangaskarði 5, og er normeraður til 40 børn

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum
- Dentur verður lagdur á at veita børnunum eitt trygt og mennandi frítíðartilboð.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið

**Setanarviðurskiftir:**
Starvið verður sett frá 01.09.2008 til 30.06.2009.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 11-17.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðarin í Frítíðarskúlanum á tlf 448786/565023

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 11.08.2008.

**NES KOMMUNA**
**650 Toftir**
**www.nes.fo**
**nes@nes.fo**

---

## Frá Havnar Handverkarafelag

Vegna summarfrí er skrivstova felagsins stongd frá og við mánadegnum 21. juli 2008. Opið verður aftur mánadagin 18. august 2008.

Eru átrokandi mál í hesum tíðarskeiðið, kann ringjast á fartlf. 234802.

**Heimasíða:** www.handverk.fo
**Teldupostur:** handverk@handverk.fo
**Fax:** 354801

**Havnar Handverkarafelag**
**Sjúrðargøta 20**
**Box 203**
**FO-110 Tórshavn**